# Ársins stólur



Við metferð er **Stingray** stólurin vorðin ein hin best umtóktu innan danskt møbla design. Fæst bæði sum polstraður, í træi og í leðri. Stingray stólurin í finér fekk fremstu heiðurslønina innan møbladesign, "Interior Innovation Award Cologne 2008" á altjóða møblastevnuni í Köln herfyri. Hetta var í kapping við 450 aðrar lutir.



## KARTELL - POP Stólur

**Piero Lissoni er upprunamaðurin til handan herliga stólin, sum er partur av møblarøðini POP hjá Kartell. Nýskapandi, einfaldur og elegantur hóskar hann inn í øll umhvørvi, og kann setast saman við øðrum møblum í røðini. Púturnar eru ómetaliga mjúkar, fyltar við dúni við einari fastari kjarnu. Stellið er úr polycarbonat.**




## Rokaligt retro

Litir og formar ganga hond í hond hjá Jan Frydendahl. Fortíð og nútíð møtast í nostalgiska 50ara útvarpinum. Litføgru salt- og piparíløtini standa væl til feminina og litfagra tíðarandan.

## RANDOM – MDF italia






## Blaðhaldari til goymibløðini

**Stílfult og tjekkað. Síðani 1992 hevur Peter-Boy design gingið á odda við blað-haldarum til bløðini, sum tú ikki vilt koyra burtur. Fæst við færri og fleiri rúmum, í ymsum sniðum.**

## Blondu lampan

**Collage Pendel** er navnið á florløttu lampuni frá víðagitnu ljósfyritøkuni Louis Poulsen. Louise Campbell hevur formgivið lampuna, sum gevur eitt sermerkt og hugnaligt ljós, av tí at skuggar og mynstur altíð broyta skap. Skerminum er úr trimum forskotnum løgum av lasaraskornum akryl.



*Louise Campbell er designari hjá Louis Poulsen*





Georg Jensen **Helena** tepottur við loki úr keramikk - Design: Helena Rohner

*www.mdfitalia.com*
*www.janfrydendahl.dk*
*www.casanovafurniture.dk*
*www.danskdesign.nu*
*www.applicata.dk*